A
Ár í synd og hugmóð livdi eg,
E A
kendi ei hann, sum leið fyri meg,
A
kendi ei hin góða lívsins veg
Hm/E7 A
til Gol-ga-ta.

Niðurlag:
D A
Náði rík er har á Golgata,
E A
fyrigeving fyri syndina;
D A
friður er har fyri sálina
Hm/E7 A
á Gol-ga-ta.

2. Harrans orð fekk meg til síðst at sjá,
hvussu djúpt í synd eg fallin lá;
fyri míni sál rann ljós upp tá
á Golgata.

3. Nú í Jesusi eg hvíli trygt,
havi á hann alt mítt álit bygt;
burt svann ófriður og ivi, frykt
á Golgata.

4. Á tann kærleiki, sum toldi tað,
ið á krossinum hann bar hin dag!
Stóra náði, at mín sál varð glað
á Golgata!

**William R. Newell (Amer.), 1868-1956.*
{Lag: Daniel B. Towner (Amer.), 1850-1919}.
(V. Danielsen týddi).